## Cafu tekur eitt ár aftrat



Álitið á høgra bakkið hjá AC Milan seinnu árini, brasilienski Cafu, hevur longt sáttmálan við italska felagið fyri enn eitt kappingarár. Cafu hevur longu fyri tíð síðan sagt, at hann kundi hugsað sær enn eitt ár í AC Milan, og hetta er nú veruleiki. Gongst sum ætlað, so luttekur Cafu fyri fimtu ferð í einum HM-endaspælið um trý ár. Hann hevur nevniliga sagt, at hann vónar at vera førur fyri at stilla upp fyri Brasilia við HM í 2010, sum verður leikt í Suðurafrika. Cafu, sum fyllur 38 ár komandi mánað, hevur leikt við AC Milan síðan 2003, har hann kom eftir seks ár í AS Roma.

## Liverpool snávaði í bronsudystinum

Eftir næsta Premier League tapið á rað eru bronsuheiðursmerkini gliðin úr hondunum hjá Liverpool. Á pappírinum var tað bara ein avgreiðsluspurningur, tá Liverpool vitjaði á Craven Cottage hjá Fulham. Liverpool hevði fleiri málmøguleikar, men einasta málið í dystinum fekk Fulham. Hesum málinum syrgdi Clint Dempsey fyri 20 minuttir fyri leiklok. Hetta var ein týdningarmikil hjá Fulham, sum nú hevur bart seg undan niðurflytingini. Hinvegin er Liverpool nú ájavnt Arsenal á triðja plássinum.

AB-HB 2-2 (1-2):

# Málrevurin steðgaði HB




*Her hevur Súni Fríði tríggjar hvítar at ansa sær. Tvær ferðir gloymdu teir í HB tó málrevin, og báðu ferðirnar takkaði hann so ruddiliga*

*Mynd: www.ab.fo*

*AB*

*HB*

### Triðju ferð í ár misti HB stig í einum á pappírinum løttum dysti. Tvær reisur slapp Súni Fríði Barbá leysur móti málinum, og so var hanns skjótur at taka av

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

»AB vann 2-2!«

Somikið greið var staðfestingin hjá heimasíðuvertinum hjá AB, og tað undirstrikar væl eisini kenslurnar, sum mundu fara ígjøgnum bæði liðini – og áskoðararnar – tá Lars Müller hevði bríkslað seinasta bríkslið sunnudagin.

Tí hóast talan ikki varð um tap hesaferð, so er eingin ivi um, at talan var um stóra fiasko hjá HB, sum annars tóktist hava sveiggjað seg upp eftir heimatapini fyri B71 og GÍ.

### Mentalur skeivleiki

Fyrst og fremst, so kunnu teir á meistaraliðnum takka sær sjálvum fyri, at talan ikki gjørdist um trý stig. Mann fyri mann er eingin ivi um, at HB hevur stinnari lið enn Formula-debutantarnir av Argjum, og fyrstu longu løtuna tóktist stigini eisini hava kós yvir um brúnna.

HB legði seg heilt skjótt á odda, tá Jákup á Borg gjørdi sær dælt av verjumistaki. Og tó át meistararnir tóktist nakað dólskir, so megnaði AB sjáldan at hótta nakað serligt. Men tá Poul Thomas Dam gav eina sjáldsama stóra gávu til Súna Fríða, takkaði málrevurin fyri.

Kanska komu bæði fyrra og seinna HB-málið ov lætt. Í øllum førum gekk ikki long tíð, áðrenn Jákup á Borg hevði endurskapt leiðsluna. Hesa ferð endaði hann gott álop við einum skoti, sum kanska ikki var tað besta, men tað smoygdi sær kortini millum beini á Magnusi í AB-málinum.

Men kvika aftursvarið bøtti avgjørt ikki um hugburðin hjá HB. Eitt slag av »tað gongur nokk« mundi fella yvir liðið, og tað gav AB møguleikan at stríða og spæla seg inn í dystin.

Og tá teir gjørdu tað, so megnaðu teir eisini at leggja eitt ávíst trýst á HB-liðið. Vunnir nærdystir bóru við sær, at AB tordi at flyta liðið nakað longur niðan á vøllin, og tó at møguleikarnir ikki gjørdust so heilt opnir, so var ein útjavning ikki heilt óhugsandi.

Og hon kom eisini, tá Súni Fríði enn einaferð var upp á spæl. Hanus Jacobsen spældi inn um verjuna, og púra leysur potaði Súni Fríði bóltin niður í málhornið, og so var frøin øgilig.

HB royndi at rakna við, men sannleikin um, hvussu tungt tað er at reisa seg, tá hugburðurin frá fyrstan tíð er skeivur, kom enn eina ferð til sjóndar. Og tað betraði ikki um fortreytirnar, at Christian Høgni Jacobsen var úti við skaða, og at Jákup á Borg fekk eitt stórt trýst fór sama veg.

Vaksandi lotið og eitt bakkandi AB-lið gjørdu tó, at HB fekk eitt stórt trýst seinastu løtuna. Men tað var tó fyri tað nógva eitt trýst uttan umhugsni. Ella, sum tikið verður til, so spældi HB við høvdinum undir arminum. Onkra ferð vóru teir kortini nær við, men teir opnu møguleikarnir komu ikki. Einar tríggjar ferðir kom Tór-Ingar tó at standa væl fyri, og onkrar vandamiklar frísparksstøður vóru eisini. Men ógvuliga sigandi slapp Magnus í AB-málinum mest sum undan at gera nakra bjarging yvirhøvur.

Og so var fagnaðurin øgiligur, tá dómarin blásti av. AB hevði tikið stig frá størsta stórabeiggjanum í fyrstu royndini. Og tó at teir á stigatalvuni enn eru undir strikuni, so munnu frensarnir ikki smæðast burtur í býarmyndini. B36 hava teir longu sent úr steypakappingini, og stigið sunnudagin kann so sanniliga eisini brúkast sum trumfur, tó tosast skal um fótbólt komandi dagarnar.

## Skulu tora betur

- Hetta var júst tað, sum vit høvdu brúk fyri. Í vikuni hava vit tosa um nakrar trupulleikar. Millum annað, at vit loyva ov nógvum løttum málum inn, og at vit ikki tora at spæla.

Orðini eigur Súni Fríði Barbá, sum við tveimum málum gav AB bæði stig og sjálvsálit í dystinum móti HB.

Og tó at hjálparvenjarin sjálvur stóð mest í fokus, so vildi hann ikki taka eitt tað einasta pettið frá liðnum og liðavrikinum.

- Eg haldi, at úrslitið tosar fyri seg. Stendur tú rætt á vøllinum og stríðist sum eitt lið, so ber til at fáa stig í hvørjum dysti. Setningurin hjá okkum hesa ferð var, at vit skuldu halda tætt, og tó at teir fáa eitt bíligt mál alt fyri eitt, so haldi eg, at okkara ætlan eydnaðist. Seinastu løtuna undan steðginum og mest sum allan seinna hálvleik megna vit at halda fast um okkara konsept, og tað er fyrst og fremst tað, sum vit ikki hava torað fyrstu dystirnar. Onkursvegna er tað so, at vit í AB eru ov imponeraðir av, at tað nú eru tey stóru liðini, sum vit spæla ímóti. Spælarar tosa um dystir fleiri vikur frammi í tíðini, og tað er tann hugburðurin, sum skal burtur. Tí vit hava ikki ráð til at hugsa um annað enn ein dyst í senn.

**-mørk**